Fyri 35 árum síðan:

# Skiparaprógv í juli 1971



*Á Føroya Sjómansskúla tóku hesir skipararaprógv í juli 1971. Aftara rað f.v.: Torleif Samuelsen, Eiði, Hjalmar Lamhauge, Rituvík, Ólavur Jacobsen, Norðragøta, Jógvan Joensen, Sørvágur, Elias Hansen, Skáli, Hans Joensen, Vágur, Jens Eli á Lava, Tórshavn, Martin Midjord, Lopra, Leivur Olsen, Vestmanna, Jóannes Johannesen, Dalur, Karl Mikkelsen, Gásadalur, Torfinn Jacobsen, Gøta og Jógvan Klosslá, Sørvágur. Fremra rað f.v.: Tórur Jacobsen, Tórshavn, D. Bjarkhamar, Vágur, Hendrik Old, Vágur, Karl Vang, lærari, Jóhan Samuelsen, lærari, Asbjørn Djurhuus, Selatrað, og Heri Højsted, Funningur,*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1971*

Fyri 35 árum síðan:

# Maskinist- og maskinmeistaraprógv í 1971



*Í juli 1971 fingu maskinmeistarar og maskinistar prógv saman við teimum, sum tóku føroyskt maskinprógv á Føroya Sjómansskúla. Aftara rað f.v.: Jónhard Berg, Tórálvur Johansen, Marius Hansen, Bergur Niclasen, Hans Djurholm, Magnus við Streym Hansen, Tórur Samuelsen, Hans P. Weihe, og Jóan Magnus Olsen. Miðraðið f.v.: Jákup A. Joensen, Kári Gaard, Pauli Joensen, Jens Weihe, Jón Eliasen, Johan Eysturoy, Terje Jacobsen, John P. Vilhelm, Kristian Tausen, Eirikur Jensen, Hartley Hofgaard, Høgni av Reyni, Wenningsted Jensen og Poul N. Mouritsen. Fremsta rað f.v.: Árni Olsen, Ísak Jacobsen, Wenzel Hentze, Hjørleif Hentze, lærari, Magnus Simonsen, lærari, Atli Jensen, lærari, K.B. Hansen, lærari, Tummas Andreasen, lærari, Mikkjal Absalonsen, Anfinn Hentze og Pól Joensen*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1971*




# Aggi Ásgerð og Vigdis í Smiðjuni

TÍÐINDASKRIV

Í døgunum 15.- 19. juli 2006 verður ein listaframsýning hjá Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir og Vigdis Sigmundsdóttir í Smiðjuni í Lítluvík.

Aggi Ásgerð og Vigdis búgva báðar í Suðuroy, men fara í døgunum 15.- 19. juli at sýna fram listarverk í Havn.

Aggi Ásgerð, var í 1995 útbúgvin á Danska Listaháskúlanum á Fyn og arbeiðir burtuav við oljumálningum. Aggi hevur egið atelier í gamla skúla í Vági og hevur júst í samband við jóansøkuna, skipað bæði fyri egnari framsýning umframt størri framsýning av myndum hjá børnunum í verkætlanini »Skapandi spírar«, sum koyrir á øðrum ári. Myndlistaverkstaðurin hjá Aggi Ásgerð hevði í fjør 108 børn í 4 liðum og í ár vóru tað umleið 80 børn úr Vági sum spíraðu.

Á framsýningi í Smiðjuni hevur Aggi Ásgerð 12 nýggjar oljumálningar, har dimensionella rúmið er tikið inn í myndaheimin. 6 málningar eru tengdir saman og kunnu tó standa frítt sjálvir, sum lutaeindir.

Vigdis Sigmundsdóttir hevur í umleið 30 ár fingist við klippmyndir. Motivini eru oftast úr føroyska bygdaumhvørvinum og á hesi framsýningini eru 13 klippmyndir, umfram plakatir. Motivini eru av Sumba, Tindhólmi, Kollafjarða kirkju, Tvøroyri, Klaksvík, Koltri, Vestmanna og fleiri øðrum støðum í Føroyum.

Vigdis hevur verið sera virkin og hevur havt fleiri framsýningar í Noregi, Danmark, Íslandi og í Føroyum gjøgnum árini.

Hetta er aðru ferð at Aggi Ásgerð og Vigdis sýna fram saman og aftur hesaferð er tað í Smiðjuni í Lítluvík i Havn. Fyrru ferð tær sýndu fram saman var fyrst í 90'unum.

Framsýningin letur upp leygardagin 15. juli kl 14. Opið er allar dagar frá kl. 14 – 18.

Haldið Sosialin



Tekna teg sum haldara nú
450,- um ársfjórðingin
SPARIÐ 395,-
í mun til leysasølu!

Besta keldan til:
» Vinnulívið
» Ítrótt
» Mentan
» Politik
» Bilar
» Merkisdagar
» Heilsanir
» Tiltøk
...o.m.a.

Ja takk! Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent óposta∂. Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:

Send lepan til:
Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn